# Páskamøtir kring alt landið

**Páskir eru tann høgtíðin har flest andalig tiltøk eru á skránni. Kring landið verða nógv møtir hildin, samstundis sum ein eisini hevur føstu, vøku, listaframsýning og dans**

PÁSKAMØTIR
*Snorri Brend*

**Samkomur:** Ein skal ikki leita leingi undir tiltøkum í bløðunum, fyrrenn ein fær eyga á tann týdning, sum páskir hava í teimum ymisku kirkjunum og samkomunum kring landið.

Nógvastaðni skipar ein beinleiðis fyri páskastevnum, onkustaðni er missiónsvika á skránni, meðan ein aðrastaðni stillisliga og einfalt savnast til møtir.

Sum nevnt aðrastaðni í blaðnum hava prestarnir úr at gera slíkar dagar, og tað sama hava eisini trúboðarar og samkomuleiðarar, tí nógv tiltøk standa á skránni hesa komandi vikuna.

Felags fyri øll hesi tiltøkini er kortini tað, at ein hátíðarheldur hesa stóru kristnu hátíðina, tá Jesus fyrst doyði á krossinum, men tríggjar dagar seinni reis upp aftur av deyða.

Hetta verður gjørt við prædikum, talum, lovsangi, listaframsýning, filmi, retreati, vøku, tilbiðjan, føstu og eisini dansi.

### Sangur og tala

Í fleiri støðum verða serstakar páskastevnur hildnar. Aðrastaðni í blaðnum er nevnd páskastevnan í Kelduni í Skálafirði, men hetta er kortini ikki einasta páskastevnan við Skálafjørðin.

Í Missións- og Ungdómshúsinum á Glyvrum skipar Heimamissiónin fyri páskastevnu, sum byrjar skírisdag og varir til 2. páskadag.

Tær fýra samkomurnar hjá Brøðrunum við Skálafjørðin bjóða eisini til páskastevnu. Talan er um samkomurnar Nebo á Toftum, Nerija á Skála, Berøa í Saltangará og Elim í Søldarfirði.

Byrjað verður við møtum í Nerija á Skála skírisdag og langafríggjadag, men síðani verða møtini flutt í ítróttarhøllina í Runavík alt fram at 2. páskadegi.

Millum aðrar páskastevnur kann nevnast ein í Skálanum í Klaksvík, ein í Missiónshúsinum í Porkeri og eina missiónsviku, sum veðrur hildin í Dali.

Frelsunarherurin í Vági fær serstaka vitjan um páskirnar, har norðmaðurin og majorurin Niels Bernhar Toppland talar. Hann var leiðari fyri Frelsunarherin í Vági í 1987 og vitjar nú aftur við talu og sangi sínum.

# Trøllarok á Hálsi

**2. páskadag skipar Havnar Hornorkestur fyri einum risa Trølla Pætur showi í høllini á Hálsi, og seinni verður konsert við Elton John Jam og Guðrun Sólju.**

TILTAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki er neyðugt hjá børnum at ganga og keða seg um høgtíðina. Ein tann besti vinurin hjá nógvum føroyskum børnum er Trølla Pætur, og hann fer at undirhalda í Havn 2. páskadag. Tá verður stórt Trøllarok í ítróttarhøllini á Hálsi, har Trølla Pætur fer at undirhalda saman við Ommuni, politistunum báðum, Erlingi og Jógvan, og ikki minst Kára handilsmanni.

Talan er um størsta trøllashowi nakrantíð, siga fyrireikararnir.

Seinni um kvøldið verður konsert við Elton John Jam, ið er sama manning sum í kenda dansibólkinum Showmenn, og teir fáa eisini vitjan av navnframu Guðrun Sólju Jacobsen. Til konsertina verður størsta ljóð- og ljósanlegg í landinum nýtt.

Trøllarok byrjar klokkan 17, meðan konsertin verður klokkan 20.



*Stjórin á Handilsskúlan í Tórshavn, Reidar Nónfjall, hevur eina lítið hugaliga uppgávu um hendi. Hann verður noyddur at geva helvtina av øllum umsøkjarunum noktandi svar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Vit mangla visiónir

**- Hava vit nakran útbúgvingarpolitikk yvirhøvur? Tú finnur onki til dømis í samgonguskjalinum. Í øðrum londum hava tey greiðar málsetningar, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Føroya Handilsskúla, nú miðnámsskúlarnir mugu geva noktandi svar til stóran part av umsøkjarunum**

ÚTBÚGVING
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Allir miðnámsskúlarnir kring landið hava í ár fleiri umsøkjarar enn undanfarna ár. Í fjør vóru tilsamans 1061 umsøkjarar til føroysku miðnámsskúlarnar, men í ár er talið komið upp á 1212. Hetta talið er tó óviðgjørt, tí summi av hesum lúka ikki upptøkutreytirnar -- men tað stendur greitt, at umsøkjaratalið í ár er nógv størri enn í fjør.

Tað er avmarkað, hvussu nógvir næmingar kunnu sleppa í skúla. Miðnámsskúlarnir hava ikki pláss fyri øllum, sum fegin vilja sleppa í skúla. Ein av hesum miðnámsskúlunum, sum noyðist at venda bakið til nógvar umsøkjarar, sum annars lúka vanligu krøvini, er Handilsskúlin í Tórshavn. Har er umsøkjaratalið økt við einum 15 til 20 prosentum í ár, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á skúlanum.

### Verri tíðir

Handilsskúlin hevur tíggju flokkar í løtuni og hevur komandi skúlaár pláss fyri sjey flokkum afturat. Men sjey flokkar afturat stendur langt frá í mát við umsøkjaratalið, tí umsøkjaratalið svarar til væl meira enn sjey flokkar. Heilir 181 næmingar hava søkt inn á FHS, og 87 hava søkt inn á HH á Handilsskúlanum.

-Vit mugu ansa eftir ikki at tulka ov skjótt. Ein orsøk til hækkaða talið kann vera verri tíðir og stórir føðiárgangir. Útlitini fyri at fáa arbeiði eru kanska ikki so góð, og tað er avmarkað, hvørjir aðrir møguleikar eru fyri tey ungu, sigur Reidar Nónfjall.

### Siga nei til helvtina

Stjórin á Handilsskúlan hevur eina lítið hugaliga uppgávu um hendi. Hann verður noyddur at geva helvtina av øllum umsøkjarunum noktandi svar. Helvtin av umsøkjarunum sleppa ikki at ganga á Føroya Handilsskúla. Fysisku rammurnar kring skúlan loyvi ikki fleiri næmingum.

### Manglandi politiskar visiónir

Men sambært Reidari Nónfjall standa vit andlit til andlits við størri og verri trupulleikum. Stjórin spyr, um vit í Føroyum vilja, at størri og størri partur av fólkaskúlanæmingunum fara víðari til miðnámsskúla. Hvar eru tær politisku visiónirnar á hesum økinum, spyr hann. Í Noreg sigur mann, at øll hava rætt at ganga í miðnámsskúla.

-Eg finni ikki eitt konkret orð í samgonguskjalinum um at menna útbúgvingarskipanina í Føroyum. Tosa vit um útbúgvingarpolitikk, so tosa vit ikki specifikt um ein skúla. Vit mugu hugsa breiðari og longri. Tað hevur eina skaðiliga ávirkan á samfelagið, at samgonguskjalið ikki er meira konkret, enn tað er, sigur Reidar Nónfjall.

### Vit missa heilar

-Eg sakni eina raðfesting. Eg sakni politiskar visiónir og strategiir. Hygg til dømis eftir fíggjarlógini. Avspeglar hon framdrift, spyr Reidar Nónfjall retoriskt.

-Hetta skapar ótryggleika í øllum samfelagnum, at vit ikki vita, hvat tann politiski málsetningurin er. Um vit í Føroyum ikki megna at orða nakrar visónir og strategiir og føra tær út í verki, so fer tann dugnaligi føroyingurin aðrastaðni. Vit missa teir góðu heilarnar, tí hesir kunnu uttan trupulleikar fara aðrastaðni at arbeiða, har umstøðurnar eru betri, sigur Reidar Nónfjall.

### Signal til landsstýrismannin

Stjórin á Handilsskúlanum heldur, at støðan í miðnámsskúlunum kring landið er eitt greitt signal til politikararnar.

-Vit mugu finna útav, hvat vit vilja. Okkara politikarar mugu taka eina støðu, og seta nakrar visiónir út í kortið fyri hetta landið. Í hesum sambandi er neyðugt at tryggja sær, at tað sum mann ger á útbúgvingarøkinum hongur saman við onnur øki í samfelagnum, hvat mann ynskir og ætlar -- vit mugu tryggja okkum, at øll øki í samfelagnum og vinnuni verða samskipaði, leggur Reidar Nónfjall dent á.

# Eykajáttan neyðug

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, verður noyddur at biðja um eykajáttan, nú talið á skúlaflokkum er so nógv hækkað.

-Talan verður helst um einar tríggjar milliónir, sigur Jógvan á Lakjuni.

### Neyðugar útbúgvingar

-Vit mugu útbúgva føroyingar til tað, sum vit hava brúk fyri. Tað er klárt, at tíðin í dag krevur vitan, men tað er umráðandi, at vit hava tær røttu útbúgvingarnar, sigur Jógvan á Lakjuni.